Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 59 - 23. mars 2007

## Deyðasjúk ongan góðan

Í hesi greinarøðini ígjøgnum hetta og komandi bløðini fer Sosialurin at viðgera umstøðurnar hjá deyðasjúkum og varðandi sjúkum í Føroyum. Sum støðan er í løtuni, er tað ongin innan almanna- og heilsuverkið, sum burtur av tekur sær teimum, ið eru uppgivin av læknum og bert bíða eftir deyðanum. Við øðrum orðum hava tey deyðasjúku ongan góðan í heilsuskipanini.

**Anna Maria Joensen**, sum hevur skrivað hesa greinarøðina um viðurskiftini hjá deyðasjúkum, er 45 ár og ættað úr Havn. Í 1991 flutti hon til Danmarkar í lestrarørindum og kom heimaftur fyri sløkum tveimum árum síðani saman við manni og dóttur. Er útbúgvin innan útflutning í Herning og hevur starvast í bæði fiskivinnu og oljuvinnu. Seinni lisið norðurlendskar bókmentir og mentan á Lærda Háskúlaunum í Helsinki, har familjan búði í sløk fimm ár. Komin aftur til Danmarkar læs hon bókmentafrøði sum høvuðsgrein og minnilutabólkar sum síðugrein á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn. Anna Maria Joensen, ið sjálv hevur royndir sum avvarðandi, sigur, at endamálið við greinarøðini er breiða út vitan og kunnleika um støðu teirra deyðasjúku, varandi sjúku og teirra avvarðandi. Samstundis at vísa á, hvat aðalmálið í norðurlondum um heildarhugsan, heildarviðgerð og umsorgan miðar eftir. Palliativur (linnandi, men ikki lekjandi) hugburður og umsorgan, sum hevur ment seg innan krabbameinsøkið burturav, er tað besta heilsuverkið kann bjóða varandi sjúkum. Henda sokallaða holistiska (heildarspekiliga) tilgongdin setir menniskjað sjálvt í miðdepilin og átti at verðið framd í verki fyri øll varandi sjúk í Føroyum, heldur Anna Maria Joensen.



*Tá sjúkan er vorðin so álvarslig, at grøvin stendur fyri durum, er ongin savnandi eind í føroyska sjúkra- og heilsuverkinum, sum tekur burturav sær av tí deyðasjúka og teimum avvarðandi*

*Tilvildarlig mynd: Jens Kristian Vang*

# Deyðin sum partur av lívinum

**Um so er, at tú ikki sjálvur hevur nøkur svar, so fært tú ein felaga, ið saman við tær møtir og rúmar teirri óvissu, sum er kring teir stóru, men ósvaraðu spurningarnar. Hetta sigur Súsanna O. Skaale, sálarfrøðingur, um sálarfrøði og deyða**

DEYÐASJÚK
*Anna Maria Joensen*
amac@post.olivant.fo

Tað gerst í dag alt meiri vanligt at søkja hjálp og stuðul hjá sálarfrøðingi millum heilt vanlig fólk í Føroyum. Enntá er tað roknað at vera ábyrgdarfult at søkja hjálp, heldur enn at verða fasthildin í angist og fobium av ymiskum slagi. Tá vit verða rakt av stórbroytingum, sum koma inn yvir okkum, uttan at vit fáa gjørt nakað, er ikki altíð nóg mikið at tosa við familju ella vinir, tí tey eru eisini merkt kensluliga. Serliga um tað nú er nakað álvarsamt.

Tá vit sum einstøk menniskju standa einsamøll yvirfyri onkrum lívshættisligum, gerast vit sjálvandi bangin og lívsgóðskan kann hvørva. Okkara umverð broytist, og vit kunnu uppliva til dømis heilsuverkið sum eina yvirmakt, ið er steinur oman á byrðu, tá deyðin stendur sum einasta alternativ. Skelkur og máttloysi setir fólk undir stórt trýst sálarliga, og hetta hava bæði heilsuverkið og sjúklingafeløg ásannað. Eitt nú hava krabbameinsfeløg vanliga tilboð um peningaliga stuðlaðar samrøður til krabbameinssjúklingar, ið skal tryggja sjúklingum bestu lívsdygd undir umstøðunum.

Men hvat snýr alt hetta seg um, soleiðis reint praktisk, og hvussu kann tað nytta at tosa, um ikki ein sjálvur kann broyta støðuna og gera seg frískan? Fyri at finna útav hvussu samrøður við sálarfrøðing kunnu hjálpa, spyrja vit sálarfrøðingin Súsonnu O. Skaale um, hvat vanliga rørir seg í einum menniskja, ið brádliga skal síggja deyðan í eyguni, tí hvussu kunnu samrøður vera til stuðul?

- Hvussu ein persónur reagerar, tá hann hevur fingið stað-fest eina álvarsliga sjúku ella fingið at vita, at hann skal doyggja, er sjálvsagt ymiskt alt eftir hvør tú ert. Tað vil siga, hvussu persónsmenskan er, hvar tú ert komin í lívinum, og hvussu tú ert fyri sálarliga. Bæði sum heild og serliga um tað mundið, tá tey ringu boðini koma, sigur Súsanna O. Skaale.

- Við hesum meini eg, at tað hevur árin á, hvussu tú tekur ímóti tungum boðum, um tú frammanundan hevur nógv at stríðast við lívinum og ert illa fyri sálarliga, ella tú ert væl fyri og leingi hevur livað í stabiliteti og javnvág við teg sjálvan, sigur Súsanna O. Skaale.

Hon leggur afturat, at tað eisini er týdningarmikið, hvørjar verjuhættir tú hevur ella ikki hevur, hvussu títt sosiala netverk er, og hvørjar grundleggjandi fatanir tú hevur av lívinum, eins væl og av deyðanum. Eisini leggur hon dent á, at tað er týdningarmikið at gera vart við, at menniskjað reagerar ymiskt, og at eitt nú krepputerapi ikki er líka viðkomandi fyri øll sjúkurakt.

### Einsemi og meiningsloysi

Spurd um tað finnast nøkur heilt serlig felags eyðkenni fyri øll menniskju í hesi støðu, sigur Súsanna O. Skaale, at tað eru kortini nøkur viðbrøgd, kenslur og tankar, sum eru rættiliga »typisk« at síggja hjá menniskjum, sum eru í kreppu.

- Tá eitt menniskja konfronterast við sín egna deyða ella deyðiligheit, verður tess grundvøllur sum oftast



*Súsanna O. Skaale starvast á privatklinikkini »Sálarfrøðisstovan« og er útbúgvin cand. psyk. frá Københavns Universitet í 2006*

*Myndi: Jens Kristian Vang*